# Leirvíkar kirkja 100 ár

**Fríggjadagin eru 100 ár liðin, síðani kirkjan í Leirvík varð vígd. Í hesum sambandi verður skipað fyri hátíðarhaldi**





*Fríggjadagin eru 100 ár liðin, síðani kirkjan í Leirvík varð vígd. Í hesum sambandi verður gudstænasta fríggjakvølið kl 19*

100 ÁRA DAGUR

Nú Leirvíkar kirkja verður 100 ár, hevur kirkjuráðið lagt eina skrá við ymiskum tiltøkum í samband við hátíðarhaldið. Skráin er løgd í samstarvi við skúlan, missiónshúsið, skótarnar og musikkskúlan.

Vígsludagin, fríggjadagin 1. desember, verður gudstænasta kl.19.00. Byrjað verður við fornminnunum á Toftanesi, og eftir gudstænastuna verður okkurt til matna í skótahúsinum.

Hátíðargudstænasta verður 1.sunnudag í advent 3. desember kl 11.00 við Hans J. Joensen, biskupi og Una Næs, sóknarpresti. Felagskórið Gøta-Leirvík syngur. Høvi verður at geva eina peningagávu til kirkjuna.

Um kvøldið kl. 19.00 verður ungdómsgudstænasta við altargongd. Kór syngur. Eftir gudstænastuna verður hugnaløta og kaffi í missiónshúsinum.

Eftir hátíðargudstænastuna 3. desember kl. 13.00 verður borðhald við døgurða fyri kirkjufólkinum í Leirvík.

Seinnapartin sunnudagin kl 15 eru øll – burturi og heima – boðin til hugnaløta og kaffiborð í Bygdahúsinum. Á skránni er eisini framførslur og sangur.

Mánadagin 4. desember kl.19.30 heldur Steffen S. Hansen, fornfrøðingur, fyrilestur í skúlanum um »Írskt og skandinaviskt – nakrir tankar um søguna hjá kristindóminum í Leirvík og í Føroyum sum heild«. Eisini verður sangur, tónleikur og kaffi.

Umframt øll hesi tiltøkini fara fólk frá Musikkskúlanum at seta dám á gudstænasturnar í adventini við tónleiki og sangi, sigur Uni Næs, prestur.

# Nú kemur fløgan hjá Flemming

**Nýstovnaða G! Records, sum er partur av G! Music, ið m. a. stendur aftan fyri G! Festival og GBOB í Føroyum, gevur fríggjadagin út nýggja fløgu við ævintýraranum Flemming Petersen**

TÓNLEIKUR

Talan er um eina dupultútgávu við eini fløgu og einum DVD. Fløgan inniheldur nýggjar sangir, fyri tað mesta hjá Flemmingi sjálvum, og DVDurin inniheldur m.a. ein dokumentarfilm um lívið hjá Flemming millum Aché indiánarnar í frumskóginum í Paraguay. Fløgan er upptikin og mixað í Føroyum, meðan filmurin er upptikin í Paraguay og framleiddur í Skotlandi.

Flemming er sera opin, erligur og óræddur sum persónur, og so veit hann eitt hav av søgum frá øllum sínum upplivingum saman við teimum hann er góður við. Fløgan inniheldur tískil í stóran mun persónligar sangir um tey, sum Flemming hevur verið mest saman við - familjan, beiggin, konan og indiánararnir.

Flemming er úr Syðrugøtu, har hann eisini býr



við familju síni nú, men Flemming búði frá 1982 og mong ár fram stóran part av tíðini millum indiánararnar í frumskóginum í Paraguay.

Jens Thomsen, sum hevur nomið sær útbúgving innan tónleikatøkni í London hevur staðið fyri upptøkunum og tónleikararnir telja millum aðrar son Flemming, Benjamin Petersen, kendur úr m.ø. Deja Vu, umframt elitutónleikarar sum Arnold Ludvig, Brandur Jacobsen, Andrass og Ólavur Olsen, Gunnar Guttessen og Regin Jacobsen. Lena Andersen syngur við á onkrum løgum. Húsan hevur samskiftisfyritøkan nörd sniðgivið.

Nýggja fløgan hjá Flemming er heimkomin og verður at fáa í sølubúðunum kring landið alt næstu dagarnir.

- Hetta er fyrsta útgávan hjá nýggja G! Records og vit eru spent at lata hetta verk úr hondum, sigur Jón Tyril frá felagnum.

- G! Records ætlar sær ikki at geva ov nógvar útgávur út um árið, men ístaðin at velja út serligar verkætlanir sum vit hava hug at fara í gongd við og síðani brúka neyðugu orkuna uppá hesar. Tíð og orka skal verða til umhugsan, ráðgeving og hjálp við øllum konseptinum, heilt frá sangskriving, framleiðslu og til promovering, image- og pr-arbeiði.

- Í samband við júst hesa fløguna hevur gongdin tó verið eitt sindur øðrvísi, enn tað, sum annars er ætlanin, tí tá ið Flemming Petersen vendi sær til okkum og spurdi um áhuga var í at geva upptøkurnar út, var alt arbeiðið longu gjørt, heilt frá upptøkum til húsa og mastering. Fyrst bar eg meg undan, men tá eg hevði lurtað eftir fløguni í eini tvær vikur dámdi mær hana so mikið væl, at eg ringdi aftur til Flemming og segði, at eg vildi fegin geva hana út og fór samstundis í gongd við at stovna plátufelagið G! Records, sum leingi hevur ligið í kortunum, sigur Jón Tyril. Hetta er fyrsta útgávan hjá G! Records, men ikki tann seinasta, tí fleiri útgávur fara at koma frá felagnum í framtíðini, lovar Jón, tó hann ikki vil siga nakað um nær næsta útgávan er á skránni.





SKIPSASSISTENTUR (DEKKARI) TIL NORRÖNU

Smyril Line søkir eftir skipsassistenti til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til skipsassistent:**
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Vera ágrýtin og røkin
- Góð samstarvsevni

**Arbeiðsuppgávur:**
- Alt vanligt skipsarbeiði
- Høvuðsuppgávan verður málinga- og reingerðisarbeiði á dekkunum v.m.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 10. desembur 2006.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til financial controller á:

+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM